# ítróttur

Nr. 47 • mikudagur • 9. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heine úti í minst tveir mánaðir

**Leikandi venjarin hjá geipuvinnarunum úr HB, Heine Fernandez, fekk um vikuskiftið so mikið álvarsligan skaða í knæið, at hann ikki verður at síggja á vøllinum í minsta lagi í tveir mánaðir**

FÓTBÓLTSSKAÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað er ein dyggur smeitur fyri HB, at leikandi venjarin, Heine Fernandez, leygardagin fekk ein so mikið álvarsliga skaða í knæið, at hann ikki verður at síggja aftur á vøllinum í minsta lagi í tveir mánaðir.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað kemur dátt við hjá HB, at skaðin, sum Heine Fernandez fekk í dysti móti KÍ í Klaksvíkskappingini leygardagin, er so mikið álvarsligur. Havnarfelagið misti undan hesum kappingarárinum álopsfelagan hjá Heina frá í fjør, Rógva Jacobsen, til íslendska KR, og eingin beinleiðis avloysari er komin fyri hann. Tá ið so Heine nú eisini er langtíðarskaddur, sært tað ikki alt ov gott út í álopspartinum hjá havnarliðnum.

**Teir ungu taka við**

Tað er eingin loyna, at HB í vetur hevur hugt seg um eftir styrki til álopspartin, men at tað ikki hevur eydnast teimum at finna nakran, har teir mettu, at samsvar var millum styrkin og útreiðslur.

Spurdur, um HB nú fer at kanna marknaðin av nýggjum fyri at finna ein nýggjan áleypara, sigur Heine Fernandez:

– Vit hyggja okkum um allatíðina, men tað er ógvuliga trupult at fáa fatur teimum røttu spælarunum. Eg tími ikki at fáa hálvar loynsir við spælarum, sum eg als einki kenni til frammanundan. Hjá okkum ræður tað um at fáa kvalitiet, har tað eisini hongur saman fíggjarliga.

– Fótbóltsumboðsmenn ringja mangan til okkara og bjóða spælarar fram. Fyrst og fremst eru tað norðurlendingar, ið hava okkara áhuga, tí tá kann eg brúka mínar keldur fyri at vita, um ein ella annar spælari er nóg áhugaverdur til okkum, sigur Heine Fernandez.

HB-venjarin sigur tó, at teir arbeiða við onkrum í løtuni, men enn er einki ítøkiligt, og tí vil hann ikki koma nærri inn upp á tað.

– Eg vil eisini nógv heldur brúka okkara ungu spælarar enn ein ella annan brasilianar, suðurafrikanar ella hvat tað skal verða, sum ikki er meira enn ein hálv loysn. Vit hava fleiri góðar ungar áleyparar, og serliga hevur Páll M. Joensen gjørt tað serstakliga væl í venjingardystunum, og um ein lítlan mánað verður Hendrik Rubeksen klárur aftur eftir skaða. Harumframt kunnu bæði Jákup á Borg og Tór-Ingar Akselsen spæla í álopinum, so vit hava fleiri streingir at spæla upp á, sigur Heine Fernandez.

Nær Heine sjálvur verður klárur at fara á vøllin aftur, er enn ógreitt. Hann sigur, at tað er eitt liðband, sum er farið, og tað er ógjørligt at siga enn, hvussu drúgvur skaðin verður, men talan er í minsta lagi um ein steðg upp á tveir til tríggjar mánaðir.

# Nýggj reglugerð - Nýggir møguleikar at sleppa uttanum hana

**Bæði BAR Honda og Minardi hava gjørt sær ómak fyri at sleppa uttanum nýggju reglugerðina. Fyrireikararnir noyðast at rannsaka seg sjálvar**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nudam@hotmail.com*

Reglugerðin fyri Formel 1 er nógv broytt í ár. Nógvar umfatandi broytingar eru gjørdar í aerodynamisku krøvunum. Hetta er fyrst og fremst fyri at gera formel 1 til ein bíligari ítrótt, so at eisini tey fátækaru liðini gerast kappingarfør.

Tíðskoyringin at avgera byrjunarstøðuna er nú í tveimum umførum. Leygardag seinnapart og aftur tveir tímar áðrenn sjálva koyringina. Byrjunarstøðan verður avgjørd eftir samanløgdu tíðini frá báðum umførunum. Hetta er gjørt, tí stór ónøgd var millum luttakararnar, at teir bert høvðu eitt umfar at vísa sína dygdir.

Liðini hava ikki loyvi at skifta dekk frá fyrstu tíðskoyring til endan av sjálvari koyringini. Regnar, kann undantak gerast. Punkterar eitt dekk ber til at skifta hetta dekkið. Hetta er eisini fyri at gera formel 1 bíligari.

Motorurin skal halda til tvær koyringar. Um bilurin ikki kemur á mál í fyrru koyringini er loyvt at skifta motor til næstu koyring. Eisini her eru tað fíggjarlig atlit sum eru tikin.

**BAR Honda valdu at steðga**

Bilarnir hjá BAR Honda vóru báðir uttan fyri stigini, tá teir nærkaðust málstrikuni í Melbourne í gjár. Teir valdu tí, ístaðin fyri at koyra um málstrikuna at koyra inn í Pit. Sostatt komu teir ikki á mál og kunnu skifta motor áðrenn næstu koyring. Teir hava við hesum ein fyrimun í næstu koyring. Í formel 1 fjølmiðlum verur gjørt eitt sindur gjøldur við hesum holinum í reglugerðini.

**Minardi fyri Avstralskan hægsta rætt**

Minardi liðið hevði ikki fíggjarligu orkuna at gera ein bil sum leik nýggju aerodynamisku krøvini. Teir spurdu tí hini liðini, um teir at sleppa at luttaka við einum ólógligum bili fyrstu tríggjar koyringarnar. Ferrari og Red Bull noktaðu at góðtaka hetta. Sostatt slapp Minardi ikki at luttaka.

Men eigarin av Minardi avstralski ríkmaðurin Paul Stoddart, fór til avstralska hægsta rætt, og bað um loyvi at luttakað hóast forboðið. FIA fekk ikki boð um hoyringina. Dómarin álegði FIA at Minardi slapp at luttaka.

Hetta hevur skapt mikla øsing, og FIA hóttir við at útihýsa Avstralia úr øllum motorítrótti. Tí tað kann ikki góðtakast at rætturin blandar seg í innanhýsis avgerðir hjá FIA.

## Bagge skal venja teir næstbestu hjá B36

Tað verður Sámal Erik Hentze elle Bagge, sum hann eisini verður róptur, ið skal venja næstbesta liðið hjá B36.

Heimasíðan hjá B36 boðar frá, at B36 leygardagin gjørdi avtalu við Sámal Erik Hentze, ið skal taka sær av 2. deildarliðnum hjá felagnum komandi kappingarár.

Sámal Erik ella Bagge, sum hann eisini verður róptur, hevur áður verið venjari hjá AB.

Sum leikari var Sámal Erik í fleiri ár fastur fúsur á besta liðnum hjá barndómsfelagnum HB, men hann hevur eisini spælt við B68 og Holstebro í Danmark.

**tn**

## John Heri aftur í HB

**Fyrrverandi B36 og B68-leikarin John Heri Dam er nú aftur í barndómsfelagnum HB**

LEIKARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið besta liðið hjá HB vandi mánakvøldið var ein nýggjur maður við til venjingina. Talan var um John Hera Dam, sum ikki hevur verið í barndómsfelagnum síðani í 1996, tá ið hann skifti til grannarnar úr B36.

Síðani hevur John Heri spælt í nøkur ár við B68, og hann hevur eisini verið uttanlands, og millum annað verið við á næstbesta liðnum hjá Fremad Amager.

HB-venjarin, Heine Fernandez, sigur, at út frá tí, sum hann sá undir venjing mánakvøldið, so metir hann so avgjørt, at John Heri er ein styrkur fyri hópin hjá HB.

John Heri virkar sum ein góður spælari, ið kann nýtast á mongum plássum, og slíkir eru altíð góðir at hava í hópinum, sigur Heine Fernandez.